## Byrgja havnina í Nuuk

Fiski- og veiðimenn í Nuuk halda fast um, at teir fara at avbyrgja havnina í býnum í morgin, og at teir fara at halda fram við tiltakinum, til landsstýrið slakar og ásetir minstaprís á fiski, soleiðis sum fiski- og veiðimenninir hava kravt. Teir seta sostatt hart ímóti høðrum, tí Ane Hansen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, vil ikki áseta minstaprísir. Johannes Heilmann, formaður hjá fiski- og veiðimonnunum í Nuuk, sigur við kringvarpið KNR, at eingir fiskimenn kunnu liva við einum fiskaprísi upp á 3 krónur og 15 oyru fyri kilo. Hann sigur tað vera serliga harmiligt, at hetta hendir, samstundis sum Royal Greenland júst hevur fingið eina hálva milliard úr landskassanum.



## Stórur tørvur á sjófólki

Hóast altjóða fíggjarkreppu ætlar norska reiðaríið Fjord1 at seta umleið 80 yvirmenn í starv í ár, og gongst eftir ætlanini hjá reiðarínum, fær tað brúk fyri umleið 300 yvirmonnum tey næstu trý árini. Fjord1 hevur verið í stórari menning tey seinnu árini og er í dag eitt av teimum størstu í Noregi við umleið 2.300 starvsfólkum. Kurt Werner Holsæter hjá Fjord1 sigur við Sunnmørsposten, at hetta til 2012 fær reiðaríið brúk fyri 100 skiparum og stýrimonnum, 100 dekkarum og 90 maskinmonnum.

# Avgerðin fellur í august



**Vit hava ikki pengarnar til umvælingarnar av Ternuni og Rituni í hondini, men tan avgerðin fellur í august, tá eykajáttanarlógin kemur fyri, sigur Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri**

FARLEIÐIR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað eru nú tveir mánaðir síðani, at Strandfaraskip Landsins læt Vinnumálaráðnum eitt tilmæli í sambandi við Nólsoyar farleiðina og farleiðirnar í Norðoyggjum.

Hetta tilmæli gekk út upp á, at nakrar umvælingar verða gjørdar á serliga Ternuna, men eisini nakrar á Rituna, so Ternan kundi setast inn á farleiðina millum Tórshavn og Nólsoy, og Ritan samstundis varð sett at røkja farleiðirnar úr Hvanasundi út í Svínoynna og Fugloynna.

Á einum borgarafundi í Nólsoy fyrst í juni legði Bogi Mortensen, stjóri á Strandferðsluni, uppskotið fyri nólsoyingar, og teir tóktust taka væl ímóti.

Seinni hava umboð fyri Norðoyggjar við Gunvá við Keldu á odda havt fund við Jóhan Dahl, vinnumálaráðharra, har gjørt varð greitt, at norðoyingar eru sera glaðir fyri at fáa Rituna í staðin fyri gamla Másan.

Tað stendur somuleiðis greitt, at eykaloyvið, sum Másin siglir við, gongur út í august, og tá stendur skipið fyri umfatandi umvælingum, skal tað halda fram við at sigla.

- Eg havi fingið at vita, at arbeitt verður í politisku skipanini við málinum, og eg vóni sjálvandi, at tað kemur ein skjót avgerð, sigur Bogi Mortensen.

Hann vísir á, at Másin stendur fyri einari umfatandi umvæling í heyst, og at tað hevði sjálvandi verið munandi meiri skilagott at nýtt tann peningin upp á loysnina, sum nú verður arbeitt við, heldur enn at nýta hann upp á Másan í verandi støðu.

- Másin skal gerast siglingarklárur so ella so, men tað tykist skilabetri at nýta peningin her og nú upp á loysnina við Ternuni og Rituni, sigur Bogi Mortensen.

### Positiv signal

Stjórin á Strandferðsluni sigur, at tað hevði verið ein stórur fyrimunur, um ein avgerð fellur so tíðliga sum gjørligt, so at disponerast kann út frá tí.

Og tað er nógv, sum bendir á, at politiska skipanin sær positivt upp á málið.

- Eg kann vátta, at fíggjarmálaráðið hevur fingið tilmælið hjá Strandferðsluni frá vinnumálaráðnum, og at málið hevur veirð fyri á landsstýrisfundi, sigur Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri.

Hann sigur, at serliga Ternan krevur ábøtur, men at málið avgjørt er áhugavert.

- Tað er klárt, at vit standa ikki við peninginum í hondini, og tí má málið bíða til eykajáttanarlógin kemur fyri seinni í summar. Men hinvegin er tað ikki ørandi tøl, vit tosa um, og við hesum fáa vit loyst ein akuttan tørv hjá norðoyingum og vælsaktans eisini hjá nólsoyingum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Í tilmælinum stendur annars, at Strandferðslan mælir til at tær tríggjar milliónirnar, sum standa á fíggjarlógini til nýtt Svínoyar- og Fugloyarskip, verða fluttar til umvælingina av teimum báðum skipunum. Hartil skal Strandferðslan sjálv finna eina millión í sparingum á rakstrinum.

*Tað verður við eykajáttanarlógini til fíggjarlógina í august, at peningurin skal játtast til umvæling av Ternuni og Rituni*

Hetta er fýra milliónir av teimum 9,4 sum krevjast til umvælingarnar. Í resta so 5,4 milliónir, sum mugu fáast til vega við eykajáttan á fíggjarlógini. Og tað er hesin peningur, sum verður játtaður – ella ikki – tá eykajáttanarlógin kemur fyri fyrst í august.

# SL hækkar mánaðarkort

**Nýggi stjórin hevur varnast eitt stórt ósamsvar millum prísirnar á mánaðarkortunum og 10-túra kortum, og tí eru prísirnir tilpassaðir**

FERÐAKOSTNAÐUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tá Strandfaraskip Landsins 1. juli 2007 gjørdu av at lækka ferðaseðlaprísirnar á øllum sjóvegis farleiðum hendi tað undarliga, at kostnaðurin í mánaðarkortum lækkaði so nógv, at tað gjørdist bíligari at keypa eitt mánaðarkort enn eitt 10-túra kort.

Hetta gjørdist skjótt nýggja stjóranum á Strandferðsluni, Boga Mortensen, greitt, og tí stóð valið í veruleikanum ímillum at antin lækka hinar framman undan lágu prísirnar, ella at hækka kostnaðin á mánaðarkortum.

Tað er ikki heilt greitt, hvussu hetta ósamsvar kom í, tá skiftið frá báðar vegir billetering til einvegis billetering fór fram. Tá lækkaðu prísirnir á styttru leiðunum úr 35 krónum fyri túrin (70 krónur aftur og fram) niður í 40 krónur báðar vegir. Á Suðuroyarleiðini lækkaði prísurin úr 70 krónum hvønn vegin til 80 krónur báða vegir.

Men tað sum tá gav misljóð var, at prísurin á mánaðarkortum lækkaði úr ávikavist 450 og 900 krónum niður í 230 og 460 krónur. Hesi tølini er munandi lægri enn prísurin fyri 10-túra kortini, sum er ávikavist 340 og 680 krónur.

- So tað er í veruleikanum bert ein justering av tí ósamsvari, ið hevur verið millum prísirnar á 10-túra kortum og mánaðarkortum, sigur Bogi Mortensen, stjóri á Strandfaraskipum Landsins.



*Talan var um, antin at seta einvegis- og 10-túra kortprísin enn longur niður, ella at hækka prísin á mánaðarkortum, sigur Bogi Mortensen, stjóri í SSL*